# Tilmæli

## um at skipa eina góða tilgongd hjá familjum við barni við autismu

Arbeiðsbólkur: Eyðvør Mortensen, Emmy Joensen, Tórunn Ósá, Sveiney Sverrisdóttir og Jónrit Halling

09. september 2014

# INNIHALDSYVIRLIT

Formæli ........ 3
Tá ábending er um autismu ........ 5
Leikluturin hjá kommununum ........ 6
Tá brekið autisma er staðfest ........ 7
Kreppuhjálp ........ 8
Almannalóggávan ........ 8
Tá barnið fer í skúla ........ 9
Fólkaskúlin ........ 9
Tannárini – vaksnamannatilveran ........ 10
Fakligar avbjóðingar ........ 11
Fíggjarligar avleiðingar ........ 11
Íverksetan ........ 12
Fylgiskjal 1 ........ 13
Fylgiskjal 2 ........ 14

# FORMÆLI

Arbeiðsbólkurin við umboðum frá Autismufelagnum, Kommunufelagnum, Psykiatriska deplinum, Sernámi og Almannaverkinum hevur gjørt hetta tilmælið um, hvussu til ber at skapa fortreytir fyri einari góðari tilgongd hjá familjum við barni við autismu.
Tilmælið byggir á arbeiðið, sum varð gjørt í trimum tvørgeiraligum arbeiðsbólkum í tíðarskeiðnum september 2013 - apríl 2014. Bólkarnir arbeiddu við hvør sínum spurdómi

- frá eygleiðing til diagnosu
- frá diagnosu til tænastu og
- samskipan av tænastum

**Frá eygleiðing til diagnosu**: Emmy Joensen, ábyrgdari í bólkinum:
Marjun Nielsen, Sveiney Sverrisdóttir, Heidi Aagaard, Joan Knudsen, Jóhanna við Streym, Berit Unn Petersen, Eyðvør Mortensen, Bjarta Vilhelm.

**Frá diagnosu til tænastu**: Tórunn Ósá, ábyrgdari í bólkinum:
Harriet Hansen, Berit Unn Petersen, Eyðvør Mortensen, Eyðun Christiansen, Sveiney Sverrisdóttir, Jákup Eyðun Gullbein, Jónrit Halling, Durita Jakobsen, Jóhanna við Streym, Petra Weihe Mikkelsen

**Samskipan av tænastum**: Eyðvør Mortensen, ábyrgdari í bólkinum:
Berit Unn Petersen, Jóhanna L. Joensen, Sveiney Sverrisdóttir, Kirstin Christiansen, Jónleif Johannesen, Jóhanna við Streym

Fyribils tilmælið frá arbeiðsbólkinum varð lagt fram á verkstovu 3. juni 2014 og hevur síðani verið til hoyringar hjá øllum, sum á einhvønn hátt hava verið við í verkætlanini. Innkomnar viðmerkingar frá verkstovuni og hoyringini eru tiknar við í viðgerðini av endaliga tilmælinum.

Í tilmælinum er ein stuttur partur um fíggjarligu avleiðingarnar, verður tilmælið tikið til eftirtektar. Bólkurin hevur í arbeiðinum valt at raðfesta tað atlit fremst, at øll børn við autismu og familjur teirra skulu fáa somu tilgongd í teirra samskifti við almennu skipanirnar. Vit meta, at tað hevur størstan týdning, at tænastan er greið og skipað - at vita skapar ró og realistiskar væntanir. Tí mugu øll hava sama rætt.

Vit nevna eisini stutt tær fakligu avbjóðingarnar, vit ímynda okkum koma, skulu vit veruliga bøta um samskiftið millum familjurnar og nógvu og ymisku almennu skipanirnar.

Tilmælið er annars  býtt sundur í tey ymsu skeiðini, talan er um í tilgongdini hjá familjum við barni við autismu

- Tá ábending er um autismu
- Tá brekið autisma er staðfest
- Tá barnið fer í skúla
- Tannárini – vaksnamannatilveran.

## Tá ábending er um autismu

Hvussu skulu foreldur og fakfólk gera, fáa tey ábending um, at eitt barn hevur brekið autismu?

Er barnið heima, kunnu foreldur venda sær til kommunulækna ella heilsufrøðing um stúranina, og hesi skulu vísa barninum til Sernám, hava tey somu stúran. Tilvísingin til Sernám byggir tá á eygleiðingar hjá foreldrum, heilsufrøðingi og/ella kommunulækna. Heilsufrøðingur og/ella kommunulækni hevur í hesum førum ábyrgdina at lýsa støðuna hjá barninum í tilmeldingarblaðnum.

Er barnið á dagstovni, kunnu foreldrini venda sær til starvsfólkini har um stúranina. Starvsfólkini skulu síðani vísa barninum til Sernám, hava tey somu stúran. Tilvísingin til Sernám byggir tá á eygleiðingar hjá foreldrum og dagstovni. Dagstovnurin hevur í hesum førum ábyrgdina at lýsa støðuna hjá barninum í tilmeldingarblaðnum.

Eru foreldur og starvsfólk ikki samd um, at ábending er um autismu, kunnu foreldur sjálvi venda sær beinleiðis til Sernám við at senda tilmeldingarblaðið.

Tilmelding til Sernám er altíð í samráð við foreldur. Eru starvsfólk og foreldur ikki á einum máli um tørvin hjá barninum, er umráðandi, at starvsfólk taka atlit til tørvin hjá barninum. Granskingin vísir, at tað er sera umráðandi, at børn við autismu fáa brekið staðfest so tíðliga sum gjørligt og harvið eisini fáa tillagaðan pedagogikk so tíðliga sum møguligt.

Tað er uppgávan hjá Sernámi at greina støðuna hjá barninum grundað á eygleiðingarnar hjá foreldrum, heilsufrøðingi og starvsfólkum í dagstovnunum. Tá støðan er greinað, vendir Sernám aftur við ráðgeving til starvsfólk á dagstovninum sbrt. innanhýsis mannagongd á Sernámi.

Summar av størru kommununum hava námsfrøðiligar ráðgevingar til kommunalu dagstovnarnar. Men tá tað í hesum førum er talan um eitt víðfevnt brek, so er Sernám at meta sum serfrøðin. So hóast kommunala ráðgevingin er inni í málinum, so meta vit, at málið kortini skal vísast til Sernám. Í slíkum førum skulu báðar ráðgevingarnar samstarva.

Í hesi tilgongdini er týdningarmikið, at foreldur fáa hjálp. Sálarfrøðingurin, sum greinar støðuna hjá barninum á Sernámi, hevur í kanningartilgongdini samrøður við foreldrini og skal gera eina avtalu um framhaldandi samrøður eftir mannagongd, sum er galdandi fyri

hetta arbeiðið á Sernámi. Er tørvur á kreppuhjálp, skulu foreldur kunnast um møguleikan at fáa hesa hjá privatstarvandi sálarfrøðingi við serligum førleika at veita kreppuhjálp. [1]

Vísir kanningin, at grundaður illgruni er um autismu, er næsta stig at staðfesta brekið. Mannagongdin, hvussu verður víst til Psykiatriska depilin, eigur at verða broytt. Sum tað er nú, er tað kommunulæknin, sum vísir børnum til psykiatriska depilin. Mælt verður til eina broyting, so bara børn, sum eru kannaði á Sernámi, verða víst til psykiatriska depilin til diagnostisering. Sernám og Psykiatriski depilin skulu avtala eina ítøkiliga mannagongd.

Serkøn á økinum, barnapsykiatari, barnalækni og psykiatari, mæla til at gera eina kanning hjá kommunulækna, áðrenn barnið verður ávíst til barna - og ungdómspsykiatriina. Barnið skal m.a. kannast fyri aðrar likamligar sjúkur, sum kunnu mistakast fyri autismu. Talan kann vera um at barnið hevur eitt syndrom, at barnið hevur onkra neurologiska sjúku, at barnið ikki hoyrir o.s.fr..

Psykiatriski depilin vil, saman við barnapsykiatara og kommunulæknunum, arbeiða við einum uppskoti um, hvussu hetta arbeiði kann skipast. Skipanin skal verða liðug áðrenn jan. 2015.

## Leikluturin hjá kommununum

Ymsir møguleikar eru hjá kommununum at vera við til at fremja betri tænastu á økinum serligur tørvur. Ein av fortreytunum er, at námsfrøðingar hava grundleggjandi vitan um økið, og at uppfylgjandi førleikamennandi skeið og fyrilestrar verða hildin regluliga. Hetta kundi verið gjørt í samráð við Sernám og Psykiatriska depilin, ella við at Kommunufelagið stendur fyri hesum.

Annar møguleiki er at stovna eitt toymi av námsfrøðingum (sum frammanundan eru í arbeiði hjá kommununum), sum hava serligan kunnleika og royndir við børnum, sum hava autismu. Kommunur, sum hava brúk fyri hesum kunnleika, kunnu so fáa vegleiðing frá toyminum í fyrstu eygleiðingini av børnum.

Eisini kunnu kommunur upplýsa hvørja aðra, um tær hava serstovur ella aðrar serligar hentleikar at bjóða øðrum kommunum - eru pláss tøk.

Tað finnast longu fleiri rit um eygleiðing av menningini hjá børnum. Kommunufelagið kann, í samráð við Sernám, arbeiða fyri, at ein einstáttaður háttur verður brúktur á dagstovnaøkinum.

[1] S.8 er tilmæli um at fáa avtalu í lag millum Heilsumálaráðið og Føroyskar Sálarfrøðingar um kreppuhjálp.

## Tá brekið autisma er staðfest

Tá brekið autisma er staðfest, skal psykiatriski depilin kunna Sernám og Almannaverkið um hetta.

Eitt tvørgeiraligt toymi við einum samskipara verður síðani skipað til hvørt barn, sum fær staðfest autismu. Toymið skal mannast við foreldrunum og einum umboði fyri hvørt av hesum økjum

- almannaøkið – heilsuøkið – námsfrøðina – sernámsfrøðina.

Tað er psykiatriski depilin, sum staðfestir brekið, og eru tað tey, sum senda fyrstu áheitanina til hinar stovnarnar um at senda umboð á fyrsta toymisfund.

Høvuðsarbeiðsamboðið hjá toyminum eru vælskipaðir netfundir við fastari skrá, sí fylgiskjal 1.

Psykiatriski depilin, Almannaverkið og Sernám eru við í øllum toymum. Er talan um barn á dagstovni, er starvsfólk haðani við í toyminum. Er talan um skúlabarn, er starvsfólk frá skúlanum við, og er skúlabarnið eisini í frítíðarskúla, er umboð haðani eisini við í toyminum. Tað eru ávikavist stovnsleiðararnir og skúlastjórin, sum eiga ábyrgdina, at best egnaða umboðið frá stovninum/skúlanum verður toymislimur.

Sum høvuðsregla verður umboðið fyri Almannaverkið samskipari hjá familjuni. Samskiparin skal tryggja, at toymið møtist eftir tørvi og í minsta lagi einaferð árliga. Í gerandisdegnum er tað so, at foreldrini samskifta við tey starvsfólk, sum eru um barnið. Men, hava tey tørv á at koma í samband við toymið, skulu tey venda sær til samskiparan. Samskiparin skal hava hollan kunnleika til almannalóggávuna og viðkomandi skipanir og hava verið á skeið um autismu/autismupedagogikk, fyriskipað av Sernámi ella Psykiatriska deplinum. Er tað skilabetri, m.a. tí familjan onki samband hevur við Almannaverkið annars, kann umboðið fyri antin Psykiatriska depilin ella Sernám heldur verða samskipari hjá familjuni.

Einstøku umboðini í toyminum hava hvør sær ábyrgdina at samskipa sítt egna øki. Toymislimirnir eru sostatt akkerspersónar fyri sín stovn/sín geira, t.e. at viðkomandi skal hava innlit í øll viðurskifti, sum hennara stovnur/geiri varðar av hjá ávísa barninum, og skal hava heimild at luttaka í øllum avgerðum. Tað er umráðandi, at nýggj starvsfólk verða sett inn í uppgávuna sum toymislimur.

Eitt annað sera umráðandi arbeiðsamboð er, at toymið ger eina virkisætlan fyri barnið. Virkisætlanin skal tryggja, at ein samanhangandi ætlan fyriliggur, sum allir partar eru samdir um, at útlitini og gongdin eru greið, og at øll kenna sína uppgávu og ábyrgd. Øll hugsandi ivamál skulu takast upp, og støða takast til bestu loysn. Virksisætlanin skal hava

fastar tættir, sum støða skal takast til – gerandisdagurin, sosial samvera, samskifti, námsfrøðiliga tilboðið, umlætting o.tíl. Ein frymil er gjørdur til endamálið, sí fylgiskjal 2. Tað er uppgávan hjá samskiparanum at tryggja, at virkisætlanin verður gjørd.

Tá brekið autisma verður staðfest hjá einum barni, fáa foreldrini ráðgeving og kunning á psykiatriska deplinum, upp til 5 ferðir.

Psykiatriski depilin ger støðumeting av barninum í samband við skúlabyrjan. Mælt verður til, at ein nýggj støðumeting aftur verður gjørd, tá barnið er 14-15 ár, og ein ætlan skal leggjast fyri vaksnamannalívinum.

## Kreppuhjálp

Eftir at ábendingin um autismu er staðfest, og familjan skal fáa gerandisdagin at virka, eigur kreppuhjálp at vera tøk til barnið og foreldrini. Er tørvur á kreppuhjálp, skal kommunulækni ávísa teimum til sálarfrøðiliga viðgerð við partvísum gjaldi frá Heilsutrygd. Foreldur kunnu fáa stuðul frá Almannaverkinum til gjald av tí partinum av kostnaðinum av samrøðum hjá privatstarvandi sálarfrøðingi, sum Heilsutrygd ikki rindar.

Bólkurin mælir til, at Heilsumálaráðið ger avtalu við Føroyskar Sálarfrøðingar um eina tilbúgving, har sálarfrøðingur við serligum førleikum at veita kreppuhjálp, átekur sær at veita hesa bráðhjálp til foreldur og barn. Mælt verður til, at Heilsutrygd og Almannaverkið viðgera umsóknir um gjald av kreppuhjálp sum bráðmál.

Viðv. bráðfeingis tørvi á hjálp, so meta vit, at eitt vælvirkandi toymi um barnið kann loysa tær flestu avbjóðingarnar sum eru, og at samskiparin síðan kann venda sær til rætta viðkomandi, er eitthvørt annað áfatt, sum krevur eitt serligt átak. Psykiatriski depilin er bráðfeingis virkandi alt samdøgrið, er talan um sjúku; t.e. sjálvskaðandi atferð, psykosa, ótti og tunglyndi.

Tá talan er bráðfeingis hjálp til foreldur ella lærara í eini tvístøðu, so kann ein partur fyribyrgjast við at undirvísa og vegleiða um autismu og autismupedagogikk. Aftur her, meta vit, kann eitt vælvirkandi toymi um barnið/familjuna koma við møguligum loysnum og vegleiðing.

## Almannalóggávan

Samskiparin hjá familjuni er oftast ráðgevi teirra í Almannaverkinum. Hesin veitir teimum ráðgeving um møguleikarnar fyri fíggjarligum stuðli sbrt. forsorgarlógini

- endurgjald fyri meirútreiðslur vegna brekið
- endurgjald fyri inntøkumiss vegna brekið

- hjálparráð

og um tænastur sbrt. forsorgarlógini

- sosiala ráðgeving
- familjuráðgeving í mun til ítøkilig námsfrøðilig amboð
- umlætting
- frítíðartilboð eftir at vanligi frítíðarskúlin er liðugur í kommununi, vanliga eftir 2./3. flokk.

## Tá barnið fer í skúla

Øll børn, sum hava fingið staðfest autismu, skulu hava eitt skipað skifti frá dagstovni til skúla/forskúla. Dagstovnurin og kommunan hava ábyrgdina at tryggja, at skúlin altíð fær kunning um støðuna hjá barninum í góðari tíð áðrenn skúlabyrjan.

Psykiatriski depilin ger eina støðumeting av barninum í samband við skúlabyrjan.

Skúlaleiðarin hevur ábyrgdina at skipa eitt hóskandi skúlatilboð, harundir at heinta neyðuga vitan og ráðgeving frá Sernámi. Spurningurin, hvat skúlatilboð er best hóskandi, verður viðgjørdur í toyminum, tá barnið er 5½ ár. Ivamálini kunnu vera fleiri:

- Skal barnið í vanligan skúlaflokk?
- Hvønn stuðul kann ávísi skúlin veita?
- Hvønn stuðul kann Sernám veita?
- Hevur skúlin royndir við børnum við autismu?
- Hava starvsfólk neyðugan førleika, ella skal førleikamenning verða sett í verk?
- Skal barnið í serflokk?
- Er serflokkur á ávísa skúlanum, ella skal barnið í annan skúla?
- Ber til at samskipa stuðulstiltakið í skúlanum og frítíðini?

Hesar avgerðir skulu eftirmetast regluliga í toyminum, sum støðan hjá barninum broytist.

## Fólkaskúlin

Skúlin hevur saman við foreldrunum ábyrgdina av, at børn ganga í skúla og hevur skyldu at taka møguligar trupulleikar upp við Sernám.

Børn við autismu krevja serligan autismupedagogikk, og tí kann tað vera trupult at veita teimum skúlatilboð í smærru skúlum. Mælt verður til lógarbroyting, so børn við autismu, sum ikki fáa nøktandi undirvísing í heimakommununi, kunnu fáa skúlatilboð uttanfyri kommunumark.

Eisini kunnu kommunur upplýsa hvørja aðra, hava tær serstovur ella aðrar serligar hentleikar at bjóða øðrum kommunum – og pláss eru tøk.

Tað er Sernám, sum fyriskipar ráðgeving til skúlan um einstaka barnið og undirvísingarstøðuna.

Psykiatriski depilin hevur við sínari servitan skeið fyri námsfrøðingum hjá kommununum og Almannaverkinum og lærarum. Hesi skeið skulu fyriskipast í samstarvi við Sernám. Stovnarnir avtala sínámillum, hvussu hetta verður skipað.

## Tannárini – vaksnamannatilveran

Fólkaskúlin skal bjóða øllum børnum við autismu lestrarvegleiðing, tá tey eru 14-15 ár.

Øll børn hava rætt til 10 skúlaár frá fólkaskúlanum, ynskja tey tað. Bólkurin metir, at øll eisini skulu hava rætt til eftirskúla, miðnámsskúla ella menningartilboð eftir lidnan fólkaskúla, ynskja tey tað.

Hetta krevur nýggj skúlatilboð, harundir nøkur við búmøguleikum.

Ein partur av virkisætlanini er at staðfesta, hvat tilboð ávísa barnið ynskir og hevur tørv á eftir loknan fólkaskúla.

Er ynski um arbeiðsbúgvingartiltak eftir loknan fólkaskúla, skal Almannaverkið skipa fyri arbeiðsroynd e.l.

Er talan um skúlatilboð, er tað Mentamálaráðið, sum skal skipa fyri hesum.

Hevur ein borgari tørv á bæði skúla og bútilboði, mugu Mentamálaráðið og Almannamálaráðið samstarva um at skipa eitt heildartilboð til viðkomandi.

Virkisætlanin skal viðgera hesar spurningar, tá barnið er um 14-15 ár:

Hvussu skal tilveran hjá barninum vera eftir loknan fólkaskúla?

Hvussu skal framtíðarbústaðurin vera?

- íbúð
- íbúð við stuðli
- pláss í búfelagsskapi
- sambýlispláss

Hvussu skal hesin borgarin uppihalda sær?

- útbúgving

- arbeiðsbúgving
- tillagað starv
- fyritíðarpensjón

## Fakligar avbjóðingar

Hvussu tryggja vit eina felags fakligheit í øllum tænastunum?

Samstarvsavtalur mugu gerast, um at

- arbeiða fram ímóti felags virðisgrundarlagi á øllum stovnum fyri arbeiðið við autismu
- skipa fyri felags førleikamenning
- hækka førleikan sum heild á stovnum, í skúlum o.s.fr., so primeru almennu tænasturnar gerast rúmligari, og síggja sínar avmarkingar
- fáa størri frálæru um autismu inn í lærara- og pedagogútbúgvingina í størri mun enn nú – ikki nóg mikið við serlinjum, tí hesi børn í stóran mun eru í vanligum stovnum og skúlum

## Fíggjarligar avleiðingar

Tað var ikki partur av arbeiðssetninginum at meta um fíggjarligar avleiðingar av tilmælunum, men í sambandi við ávegis kunningina á verkstovuni í juni mánaða varð heitt á bólkin, um at viðgera henda partin.

Bólkurin metir tað vera ivasamt, um avvarðandi stovnar kunnu fylgja øllum tilmælunum við verandi játtan.

Bíðitíðin at sleppa til sálarfrøðing og eygleiðing á Sernámi er í meðal 1 ár.

Mælt verður til, at bíðitíðin helst skal vera 1. mánað og í mesta lagi 3 mánaðir. Skal stovnurin røkka hesi áseting, verður neyðugt at økja starvsfólkaorkuna til hesar uppgávur.

Almannaverkið tekur undir við hugsanini, at samskiparauppgávan verður best røkt har. Men av tí at stovnurin, sum er, bert hevur samband við uml. 75 børn við autismu, og samlaða talið er 150-200, so fer tann avgerðin - at vera samskipari hjá øllum børnum við autismu - at krevja meirorku sv.t. 1½ sosialráðgevarastarv til hesa uppgávu. Verður tað ikki so, má undantakið, at annar stovnur átekur sær samskiparauppgávuna, brúkast í teimum førum, familjan ikki annars hevur samband við Almannaverkið. Stovnurin hevur ikki enn gjørt metingina, um hendan uppgáva kann røkjast við umskipan av arbeiðinum á stovninum ella neyðugt verður við meirjáttan.

Skulu øll hava rætt til eitt skúla-/menningartilboð eftir loknan fólkaskúla, krevur tað serliga játtan at stovnseta hetta.

## ÍVERKSETAN

Bólkurin mælir til, at skipanin við teirri góðu tilgongdini byrjar 1.1.2015 og at miðað verður eftir, at allar familjur hava fingið tilboðið 1.1.2016.

Eyðvør Mortensen
umboðandi Almannaverkið

Emmy Joensen
umboðandi Sernám

Tórunn Ósa
umboðandi Psykiatriska Depilin/Landssjúkrahúsið

Sveiney Sverrisdóttir
umboðandi Kommunufelagið

Jónrit Halling
umboðandi Autismufelagið

# FYLGISKJAL 1

## Skrá fyri netfundir

**Avvarðandi** **Heilsuøkið** **Almannaøkið** **Sernámsfrøðin** **Námsfrøðin**

**Netfundur viðv. ......................................**

| **Luttakarar:** | **navn** | **stovnur/starv** |
|---|---|---|
| **Avvarðandi:** | | |
| **Heilsuøkið:** | | |
| **Almannaøkið:** | | |
| **Sernámsfrøðin:** | | |
| **Námsfrøðin:** | | |

**Skrá:**

| Pkt. | Innihald | Ábyrgdarpersónur |
|---|---|---|
| 1. | **Framløga** | |
| 2. | **Vitan/støðan í løtuni**<br>Verandi tiltøk<br>Menning<br>Trivnaður | |
| 3. | **Felags fatan**<br>Styrkir<br>Serligur tørvur<br>Ynskir<br>Mál | |
| 4. | **Virkisætlan**<br>Ítøkiligar avtalur<br>Endamálsorðingar | |
| 5. | **Eftirmeting/meting**<br>Næsti fundur | |

# Fylgiskjal 2

## Virkisætlan

**Barn**

| | | |
|---|---|---|
| Navn | Bústaður | Samband |
| Mamma | Bústaður | Samband |
| Pápi | Bústaður | Samband |

### Tvørgeiraligt toymi

| | | |
|---|---|---|
| Avvarðandi | | Samband |
| Samskipari | Stovnur/starv | Samband |
| Akkerspersónur heilsuøkið | Stovnur/starv | Samband |
| Akkerspersónur almannaøkið | Stovnur/starv | Samband |
| Akkerspersónur sernámsfrøðin | Stovnur/starv | Samband |
| Akkerspersónur námsfrøðin | Stovnur/starv | Samband |
| Akkerspersónur námsfrøðin | Stovnur/starv | Samband |

| | | |
|---|---|---|
| Kommunulækni | Bústaður | Samband |
| Heilsufrøðingur | Bústaður | Samband |
| Dagstovnur | Bústaður | Samband |

| Skúli | Bústaður | Samband |
|---|---|---|
| Frítíðarskúli | Bústaður | Samband |
| | | |

**Verandi støða**

| Støðulýsing: |
|---|
| Meting av førleikum og skerjingum (*kropsligum, sálarligum, menningarligum og sosialum):* |
| Verandi fyriskipanir:<br><br>*Familjulív*<br><br>*Frítíð*<br><br>*Dagstovnur*<br><br>*Skúli*<br><br>*Frítíðarskúli*<br><br>*annað* |

**Høvuðsmál**

| Ynski hjá familjuni | |
|---|---|
| Mál | tíðarætlan |

**Mál**

| Mál | Fyriskipanir | tíðarætlan | uppfylging |
|---|---|---|---|
| Lutmál | Fyriskipan HMR | tíðarætlan | uppfylging |
| Lutmál | Fyriskipan AMR | tíðarætlan | uppfylging |
| Lutmál | Fyriskipan MMR | tíðarætlan | uppfylging |
| Lutmál | Fyriskipan | tíðarætlan | uppfylging |

Barn/foreldur loyva, at toymislimir fáa skrivligt eintak av virkisætlanini.

Undirskrift Barn/foreldur Samskipari